**NINTENDO 64**
við 1 spæli og tveimum joystikkum, til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 448287

**SEGA MEGA DRIVE**
v/ 2 joystikkum og 10 spølum til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 448699

**TELDUSPÆL**
Óbrúkt FIFA 2000 , til sølu fyri 300 kr., nýprísur 400 kr.
Tlf. 312926

**TELDUSPØL**
til sølu. GTA 2, FIFA 99, FIFA soccer manager, Hidden and dagerous, Red Alert, Football manager 2000, Worms Armageddon, S´Commandos, Aliens Vs Perdator.
Tlf. 315723, spyr eftir Jákup Erik

## Tónleikur

**AIWA NSX-S909**
Til sølu fyri einans 1.000 kr. Onki brúkt, diskspælarin riggar ikki, hátalarar fylgja ikki við. Sær sera gott út, hevur nógvar møguleikar.
Nýprísur 7.800 kr.
Tlf. 318183 best eftir kl. 18.

**BASSFORSTERKARI**
15" bassforsterkari/kabinett av merkinum Trace Elliot til sølu um hóskandi boð fæst, hevur hetta tín áhuga, so ring
tlf. 314212 ella 214112

**HÁTALARAR**
Dali 109, 500 w stk., nýprísur 6.000 kr. Til sølu fyri hálvan prís.
Tlf. 444276

## Út- & Sjónvarp

**2 1/2 ÁRA GAMALT**
Bang og Olufsen sjónvarp, 28", av merkinum Avant 6000, við innbygdum video og el-sokli, sum kann snæra sjónvarpinum.
Tlf. 281919 ella 315835

## Ymiskt

**KØLARAR**
Sera bíligir, nýggir kølarar til flest allar bilar á goymslu.
**Auto-Fjósið**
Viðareiði,
Tlf. 451082 - 451162
Fáast eisini á hesum støðum:
**BILMIK,**
Slættanesgøta 9,
100 Tórshavn,
Tlf. 318383
**Bilverkstaðið,**
Fuglafjørður, tlf. 444978
**S. Fagradal,**
Sandur, tlf. 361754

**APEX FERÐASEÐIL**
ynskist til keyps. Keypmannahavn - Vágar og aftur 12 feb. til 18. feb.
Tlf. 312915 ella 283390

**FARTELEFONIR**
til sølu. NMT 450. Maxon fartelefon. Ericsson NH 238 fartelefon 2.000 kr. stk.
Tlf. 282116

**FERÐ TIL SØLU**
Ferð til Danmarkar við Norrønu fyri ein, aftur og fram, ella fyri 2 annan vegin fyri 1.500 kr.
Tlf. 449455

**SOLARIUM**
bíliga til sølu. Cyrano 28-3, v/ nýggjum rørum.
Tlf. 372110 ella 225210

**MOTOROLA NMT 900**
hevur 1 eyka battarí, borð ladara, ferðaladara og tasku. Sera bíliga til sølu.
Tlf. 441428 ella 284428 eftir kl. 17

**FLOGFERÐASEÐIL**
Føroyar - Keypmannahavn, ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 361603 ella 281580

**GSM TELEFONIR**
Til sølu, Philips Diga 450 kr. Nokia 5110 v/ tasku 1.200 kr.
Tlf. 447224

**HURÐ TIL BILHÚS**
Træhurð til bilhús, bíliga til sølu. H: 2,30, B: 3,0.
Tlf. 317565 ella 311950

**PARABOL TIL SØLU**
1 ára gomul, skermur ca. 80 cm í diametur, analogur. Móttakari; kann taka 2 kort í senn. Merki: Triasat SR 4009. Einans 1.500 kr.
Tlf. 318183, eftir kl. 18

**RABARBURØTUR**
til sølu.
Tlf. 444558

**RÆSTKJØTAVEITSLA**
í trýkantumráðnum (Vejle, Fredericia og Koldig). Føroyingafelagið „Firvaldar“ heldur ræstkjøtaveitslu í Bredsten Håndværkerhus leygardagin 29. jan. kl. 19. Kostnaður: limir 170 kr. og ikki limir 220 kr. Tekning innan 20. jan.
á tlf. 75926670

**LOTTO**

**Vika 1 - 8. januar 2000**

Vinnaratøl: **07 - 22 - 26 - 27 - 29 - 33 - 35**
Eykatøl: **30 - 32**

| | |
|---|---|
| 7 vinnaratøl: | **4.170.719,- kr.** |
| 6 vinnarat.+1 eykat.: | **82.781,- kr.** |
| 6 vinnaratøl: | **4.771,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **160,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **35,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**TIPS**

## TIPS 12 úrslit

**Vika 1**
**8.–10. januar 2000**

| | |
|---|---|
| 1. Arsenal–Leicester | X |
| 2. Manchester C.–Leeds | 2 |
| 3. Bari–Venezia | 1 |
| 4. Cagliari–Piacenza | 1 |
| 5. Lazio–Bologna | 1 |
| 6. Parma–Juventus | X |
| 7. Perugia–Udinese | 2 |
| 8. Torino–Lecce | 2 |
| 9. Verona–Reggina | X |
| 10. Ravenna–Genoa | 1 |
| 11. Treviso–Chievo | 1 |
| 12. Vicenza–Monza | 1 |

**Prognosa**

| | |
|---|---|
| 12 rætt: | **28.644,- kr.** |
| 11 rætt: | **911,- kr.** |
| 10 rætt: | **91,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## Viðmerking:

# Vargarnir í samgonguni avdúkaðir



Seinasta stríðið í samgonguni viðvíkjandi ásetingarlógini av pensjónum, førdi við sær, at Løgmaður avdúkaði vargarnar í samgonguni. Teir hava snorksovið í tímanum. Løgmaður segði bart út, at øll lógarmál verða send samgonguflokkunum til ummælis, áðrenn hesi verða løgd fyri løgtingið. Soleiðis varð eisini gjørt við umstríddu pensjónslóggávuni.

Tá eingin tinglimur í samgonguni gjørdi vart við seg — ongar viðmerkingar vórðu gjørdar - varð málið sent løgtinginum í teirri trúgv, at lógin var sum tilætlað. Samgonguorðavavsturin um innanholaðar pensjónir, ov lítlar játtanir á fíggjarlógini til millum annað sjúkrahúsverkið, strandferðsluna o.s.fr., eru tí undanførslur, fyri at bjarga egnum politiskum skinni, og ein roynd at tváða hendur (góða mamma tað var ikki eg).

Sambært løgmanni og varaløgmanni, gera samgongutingmenn als ikki sítt tingarbeiði til lítar, hóast ríkiliga lønarvøksturin. Tingarbeiðið og sjónleikurin, sum fer fram frá løgtingsins røðarapalli, millum samgongutingmenn, er í allar hægsta grad tekin um ein veikan samgonguleiðara.

Hetta spæl fyri gallaríinum, kann tí eisini tykjast at vera ein roynd at fjala útyvir fullveldisavleiðingarnar, sum eru fyri framman.

Páll, Finnur, Torbjørn og Bjarni verða tí noyddir at kyssa koyrilin enn eina tíð, fyri at náa fullveldisendamálinum, sum løgmaður hevur sett sær.

Hesaferð hava pensjonistar møguleikan fyri at verða hoyrdir — næstu ferð — tá fullveldisdreymurin er vorðin veruleiki, vendist ikki aftur. Tá má svíða sum svøllur.

- Eitt gott nýggjár, við vón um eina bjarta framtíð, verður ynskt øllum føroyingum, burtur sum heima.

**Á trettanda**
**Flemming Mikkelsen**
**løgtingsmaður**

# Ár 2000 trupulleikin



Fyrsti ár 2000 trupulleikin hjá landsstýrinum var baði stórur og álvarsligur. Onki fantilsi vísti seg at vera á nýsamtyktu pensiónslógini hjá samgonguni.

Áðrenn jól bað landsstýrið allar pensjonistar brynja seg við toli, tí ikki gjørdust stundir, at gjalda pensjónina út til jóla. Roknstykkini við giftum pensjonistum, ikki giftum pensjonistum, avlamispensjonistum o.s.fr., høvdu tikið longri tíð enn vantað. Men tær munagóðu hækkingarnar skuldu so koma ímillum jóla og nýggjárs.

Hetta man vera fyrstu ferð, síðani fólkapensjónin varð innførd, at pensjonistar ikki hava fingið lønina áðrenn jól.

Tolin góðfólk, sum okkara pensjonistar eru, settust teir at halda jól við tí stóra í vantu, sum landsstýrið hevði lovað teimum. Lønarhækkingin fór at koma millum jóla og nýggjár. Upphæddin varð víst á sjónvarpsskíggja, so eingin skuldi vera í iva um støddina.

So upprann dagurin, tá ið lønarposin kom. Tað sum ikki hevði verið fyrr, tað bleiv nú.

Tað sum skuldi verða hækkingar, hoyrist at vera blivið til lækkingar.

Okkara pensjonistar eru sum slidnir á nevið. Vita hvørki úr ella inn, og enn minni, hvørjum teir skulu trúgva, Landsstýrinum, Trivnaðarnevndini ella SvF.

**Høgra veit ikki, hvat vinstra ger**

Ár 2000 trupulleikin hjá landsstýrinum, sigst vera funnin. Hann er í skattalógini, sum tí má broytast, fyri at fáa peningin at passa. - Heldur ikki ta lógina, vóru stundir at leggja fyri løgtingið, áðrenn ár 2000.

Løgmaður skyldar uppá manglandi floksdisiplin. Løgtingsmaðurin av Sandi sigur, at løgmaður skjýtur við síðuna av, tí hann hevði treytað sær í vár, at landsstýrið longu farna summar skuldi leggja pensjónslógina fyri løgtingið, og ikki uppundir jól. Vit onnur kunnu bara siga- og staðfesta, at ”disse regeres vi af” og soleiðis verða okkara pensjonistar viðfarnir av Føroya landsstýri og samgonguni við túsundáraskiftið.

**Hvussu halda tit, at fantilsið verður á øðrum økjum eftir loysingina?**

Ein sera avgjørdur og royndur tíðindamaður segði herfyri nakað soleiðis í útvarpsending, at føroyskir politikarar eftir hansara meting ikki fóru at megna at stýra og umsita nakað fullveldi.

Hansara ára longu royndir sum tíðindamaður og eygleiðari (til dømis við Føroya rætt) høvdu eisini sannført hann um, at politiski dunnugarðurin og habilitetstrupulleikin við ein serføroyskan rætt, fór at seta rættartrygdina heilt út av spælinum.

Vit eru helst nógv í Føroyum, sum hava somu áskoðan sum hesin tíðindamaður: At við eini sokallaðari serføroyskari rættarskipan fer tryggleikin ikki at verða hin sami.

Men vit skulu samstundis minnast til, at hetta forar ikki loysingarpolitikarum, at fremja loysingina við eini rættarskipan av hesum slag. Flestu minnast væl tjóðveldisútsagnina ”Heldur dømdur órættvíst á føroyskum, enn rættvíst á donskum”.

Fyrsti ár 2000 trupulleikin við pensiónslógini, man vera góð ábending um, hvat annað føroyingar eisini hava í vantu eftir loysingina.



**Fyrsti millumflokkur í Havn, august 1945:**
Av tí at okkurt kom skeivt fyri í myndatekstinum til minningarorðið um Herluf Joensen og Poul Sloan í blaðnum leygardagin, prenta vit myndina umaftuur:

Standandi frá vinstru: Gentan við pappírinum er Annelise Kaaber og gentan við einari hond á øksluni er Birna Helmsdal, andlitið omanfyri er Hervør Joensen, síðani Elsebeth Sloan, Árni Isholm, Andreas Reinert, Símun Simonsen á Høgabóli, Bjørn Isholm og omanfyri hann Kjartan Justinussen.

Sitandi frá vinstru: Anders Hansen - við hondunum fyri andlitið, Poul Sloan, Herluf Joensen, Fróði Mouritsen, Harry Lava og Lítli (Andreas Johansen).

Av dreingjunum á myndini er bert Andreas Reinert á lívi.

Annars er at siga, at flestu dreingirnir eru í gummiskóm. Yvaleyst úr rekagummi - kanska gjørdir í Hesti? Hetta er jú beint eftir kríggið og undir krígnum, og beint aftaná var annað tilfar ikki at fáa, brúkti tú ikki húðaskógvar. Fróði er eisini í rotuskóm, hvítir tveingir er mannfólkalitur. Plousfour var eisini tá buksumóti.

**DUSINO**

**Vika 1 - 9. januar 2000**

Vinnaratøl: **03 - 05 - 06 - 07 - 08 - 09 - 10 - 15 - 17 - 19 - 20 - 23**

| | |
|---|---|
| 12 í sama punti: | **Eingin vinnari** |
| 11 í sama punti: | **3.307,- kr.** |
| 10 í sama punti: | **104,- kr.** |
| 9 í sama punti: | **25,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

## Heilsanir



***Gó›a Anja***
Hjartaliga tillukku vi› 22 ára degnum 7. jan. Vónandi ver›ur ta› líka stuttligt at ver›a 22 ár sum 21 ár. Harrin signi framtí› tína.
***Heilsan Brynhild og Ólavur***



***Gó›a elska›a Jóhanna***
Hjartaliga tillukku vi› 2 ára fø›ingardegnum í dag 8. jan. Jesus pápi signi framtí› tína.
***Muss og klemm frá ommu, abba og ommba***



***Gó›a elska›a Marianna***
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára degnum. Eisini ein heilsan til Tordis. Jesus pápi ver›i hjá tykkum.
***Heilsan omma, abbi og Ba***



***Hey grussa***
Bert ein lítil heilsan á 45 ára degnum, vit gle›a okkum til leygarkvøldi›.
***Heilsan vit bá›ir bláu***



***Gó›a elska›a Jóhanna***
Hjartaliga tilluku vi› 2 ára fø›ingardegnum í dag. Spennandi ver›ur um tú hevur líka gó›an hug til hetta, tá i› tú ver›ur vaksin?
***Muss og klemm frá mammu og babba***



***Halló omma***
Altí› til rei›ar vi› n‡baka›um!
***Heilsan kaffigesturin H.H.H.***



***Gó›a elska›a Marianna***
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára fø›ingardegnum sum ver›ur 9. jan. Jesus pápi ver›i hjá tær.
***Heilsan mamma, babba og Tordis***



***Gó›a elska›a Unnur***
Hjartaliga tillukku vi› 4 ára fø›ingardegnum 8 jan. Jesus pápi signi framtí› tína.
***Kærar heilsanir frá okkum, mamma, Ingolf og Reidar***



***Gó›i Álvur***
Hjartaliga tillukku vi› 35 ára fø›ingardegnum sum var í gjár. Vónandi hev›i tú ein gó›an dag. Vit gle›a okkum nógv til rundstykkini mikumorgunin.
***Heilsan starvsfelagarnir***



***Hey Exit***
Hjartaliga tillukku vi› 45 ára degnum, eisini ein heilsan til Janu vi› 25 ára degnum .
***Heilsan gita hvør?***



***Gó›i Bár›ur***
Omma og abbi á Selatra› vilja ynskja tær hjartaliga tillukku vi› 6 ára degnum, her ert tú ordiliga bóndaligur.

## T¿kk



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara 10. juli 1999 ógloymandi. Vi› ynskjum um eitt av Harranum vælsigna› n‡ggjár.
***Sólvá & Bjarne***


nøvn nú **5 ferðir um vikuna** **25,- kr.**

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ..........................................................
Bústaður: ..................................................
Bygd/býur: ............................ Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«